At gera SEV til partafelag førir til stórar eykarokningar

–SEV verður rikið so væl sum tilber og eg dugi ikki at síggja, at brúkarin fer at fáa bíligari streym, um vit verða skipað sum eitt partafelag, sigur John Danielsen, fíggjarleiðari í SEV

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað er ringt at síggja, hvussu el-brúkarin skal kunna fáa nakað burturúr, um SEV verður skipað sum eitt partafelag.

Tað sigur John Danielsen, fíggjarstjóri hjá SEV.

Tað eru limirnir í Kommunusamskipan Føroya, sum á seinasta fundi í Havn í farnu viku, umrøddu málið um at gera SEV til eitt partafelag.

Tað eru seks tær størstu kommunurnar í landinum, Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar, Tvøroyrar, Vágs og Fuglafjarðar kommuna, sum eru limir í Kommunusamskipan Føroya og tær fara nú at kanna fyrimunir og vansar við at gera SEV til eitt partafelag.

SEV stjórin Klæmint Weihe er burturstaddur og fíggjarleiðarin, John Danielsen, vil ikki leggja seg út í málið sum so.

Hann er bara embætismaður hjá SEV og hann heldur, at hatta er eitt mál, sum eigur at verða viðgjørt ímillum tey, sum eiga SEV, og ikki minst eigur hesin spurningurin at verða viðgjørdur í umboðsnevndini og stýrinum fyri SEV.

Men sum heild kann hann siga, at hann dugir ikki at síggja, hvussu brúkarin skal kunna fáa nakran fyrimun av at SEV verður gjørt til eitt partafelag.

–Eftir mínum tykki verður SEV rikið rættiliga væl og eg dugi ikki at fáa eyga á, hvussu raksturin skal kunna gerast bíligari, bara tí at tað verður umskipað sum eitt partafelag.

Hann nevnir t.d. at SEV brúkar rættiliga nógva olju og hon verður ikki bíligari, av st skipa SEV til eitt partafelag.

– SEV er eitt lutafelag og eg dugir ikki at ímynda mær, hvussu tað fer at gera raksturin bíligari, um tað verður gjørt til eitt partafelag.

Eyka útreiðslur

Hann sigur tvørturímóti, at verður SEV gjørt til eitt partafelag, fer tað at føra stórar útreiðslur við sær, sum felagsskapurin ikki hevur í løtuni.

– Sum er, sleppur SEV undan at betala skatt. Men verða vit gjørd til eitt partafelag, skulu vit eisini betala partafelagsskatt.

Hann sigur eisini, at ein annar spurningur, sum støða skal takast til, er, hvussu farast skal fram, um kommunur selja síni partabrøv í SE.

– Hvør skal kunna keypa partabrøvini. Í øllum førum verður onki at ivast í, at tey, sum fara gera íløgur í partabrøv í SEV, gera tað eina og aleina tí at tey vilja hava avkast.

–Verður SEV gjørt til eitt partafelag, fer kravið um vinningsbýti tí uttan iva at verða reist á aðalfundunum.

– Hetta verða í hvussu so er tveir ítøkiligar og munandi broytingar í búskapinum hjá SEV, um felagsskapurin verður gjørdur til eitt partafelag,

Hann leggur afturat, at tá ið SEV so fær tvær slíkar týðandi útreiðslur afturat, kann tað eisini hugsast, at streymurin fer upp.

Hann sigur, at ein annar máti er sjálvandi at steðga við útbyggingum og at draga tað út at nútímansgera netið, fyri at fáa ráð til hesar eyka útreiðslurnar.

Hinvegin dugir hann illa at hugsa sær annað, enn at útbúnaðurin hjá SEV má altíð verða so góður sum gjørligt í einum framkomnum landi sum Føroyum

Og hóast hann heldur, at SEV hevur gjørt eitt stórt arbeiði í so máta, kann tað sjálvsagt altíð verða betri.

– Men skal SEV gerast til eitt partafelag, so at raksturin verður broyttur til at snúgva seg um at fáa so stórt avkast sum gjørligt av eini íløgu, fara raðfestingarnar sjálvandi at verða gjørdar øðrvísi.

John Danielsen sigur, at hinvegin fer tað at føra til nakrar bygnaðarligar spurningingar, um SEV verður umskipað til eitt partafelag.

– Eitt nú skal felagsskapurin so fylgja partafelagslógini, umboðsnevndin verður tikin av og í hennara stað kemur aðalfundurin og aðalfundurin skal so velja stýrið, sum umboðsnevndin nú velur.

– Verður SEV gjørt til eitt partafelag fer tað at gera raksturin munandi dýrari, enn hann er nú, tí eftir mínum tykki er SEV rættiliga væl rikið nú, sigur John Danielsen, fíggjarleiðari

Um trý ár fáa suðuroyingar nýggjan Smyril

Fimm tilboð eru komin inn uppá at projektera nýtt skip til Suðuroyarsiglingina og byggingin byrjar næsta ár

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er rættilig gongd komin á arbeiðið at útvega ein nýggjan Smyril til suðuroyarsiglingina hjá Strandferðsluna.

Og bæði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, og leiðslan á Strandferðsluni, eru samd um, at seint í 2003 skal hann koma í sigling.

Strandferðslan hevur boðið arbeiðið at projektera skipið út og tey tilboðini komu inn mánadagin.

Fimm skipasmiðjur í Føroyum, Noregi og í Danmark vóru bidnar at geva tilboð uppá at projektera tann nýggja Smyril og tær lótu allar tilboð inn.

Tilboðini lógu úr 525.000 krónum upp í 800.000 krónur. Sostatt var 275.000 krónur á muni á tí dýrasta og tí bíligasta tilboðnum.

Men Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandferðsluni, vil ikki siga, hvørji tilboð, hvør av skipasmiðjunum eigur.

Skipasmiðjurnar, sum vóru bidnar at geva tilboð eru, Tórshavnar Skipasmiðja, Vik & Sandvik og Kværndokk & Eldoy í Noregi og tær báðar donsku skipasmiðjurnar, Knud E. Hansen og Dwinger Marine Consult.

Ætlanin er at arbeiða skjótt og í næstu viku fer Strandferðslan at viðgera tilboðini. Seinast hálvan oktober skuldi tað helst verðið gjørt av, hvør skal projektera skipið.

Projekteringin skal vera liðug fyri jól og komandi ár skal byggingin byrjað.

Magnus Magnussen sigur, at byggingin skal byrja næsta ár og seint í 2003 skal nýggi Smyril setast í sigling.

Peningur settur av

Seinasta fríggjadag høvdu Strandferðslan og vinnumálastýrið kunnandi fund fyri politikarum og fjølmiðlunum um nýggja Smyril.

Bjarni Djurholm, Landsstýrismaður í vinnumálum sigur, at nýggi Smyril er raðfestur fremst av teimum íløgum, sum skulu gerast.

Og hann leggur afturat, at ongin ivi er um, at tað í løgtinginum yvirhøvur er politiskur vilji at gera hesa íløguna nú.

Tí verður peningur settur av á fíggjarlógini fyri 2001 til at byggingin kann byrja av álvara koamandi ár.

–Hetta er ein íløga sum er alneyðugt fyri at suðuroyingar skulu hava javnbjóðis møguleikar við allar aðrar føroyingar til at búgva, liva og at virka.

–Hetta er eisini ein íløga, sum skal tryggja tørvin hjá vinnuni.

–Suðuroyarfjørður er ógvuliga ringur sjógvur og skalt tú byggja eitt skip, sum lýkur neyðug krøv til tryggleika og hentleikar, krevst eitt so stórt og gott skip, sum her er talan um.

Bjarni Djurholm sigur, at nýggja suðuroyarskipið fer at kosta einar 250 milliónir.

Talan verður um eitt skip sum verður einar 115 metrar langt og sum skal sigla 21 míl og umborð verður tað sera væl útgjørt fyri at gera umstøðurnar hjá ferðafólki, manning og farmi so góðar sum gjørligt.

Nýggi Smyril fer at taka um 800 fólk, men hann tekur tvær ferðir so nógvar bilar sum Smyril nú ger.

– Tá ið skipið siglur so skjótt, fer tað at bera til at sigla fýra ferðir ímillum Havnina og Suðuroynna um dagin, um tað verður neyðugt einaferð í framtíðini sigur Bjarni Djurholm.

Fríggjadagin vórðu tingmenn kunnaðir um ætlanina at byggja nýggja Smyril til Suðuroyarsiglingina. Skipið skal vera liðugt seint í 2003

Lei›arar hava rætt at úttala seg

Fyrrverandi sjúkrahúslei›arin var› sagdur úr starvi, tá hann úttala›i seg har›liga um avlei›ingarnar av sparingum. Grundlógarnevndin setir spurnartekin vi› líknandi mál

JOHN JOHANNESSEN

Fyrrverandi sjúkrahúslei›arin, Jógvan Mørkøre, var› í vár sagdur í starvi, orsaka› av, at hann millum anna› alment greiddi frá, at ætla›ar sparingar á Landssjúkrahúsinum fóru at merkja hópuppsagnir.

Landsst‡risma›urin í Almanna- og Heilsumálum metti, at sjúkrahúslei›arin í hesum føri hev›i veri› illoyalur móti politisku skipanini.

Setir spurnartekin

Møguleiki er tó fyri, at uppsøgnin er brot á talufrælsi›, stovnslei›arar hava.

Grundlógarnevndin, sum í løtuni fyrireikar eina møguliga grundlóg fyri Føroyar, setir í líknandi dømi spurnartekin vi›, um slíkt ikki júst er brot á talufrælsi›, sum er sta›fest í donsku grundlógini.

Harafturat sta›festir danski umbo›sma›urin hjá fólkatinginum ta› sama í ø›rum líknandi máli.

Hetta máli› sn‡r seg um ein læknastjóra, sum hevur úttala› seg um ætlanina at flyta eina deild av sjúkrahúsi hansara til eitt anna› sjúkrahús.

Frítt at úttala seg

Í hesum málinum helt umbo›sma›urin, at lei›slan á rei›iliga sjálvstø›ugum almennum stovnum, sum til dømis sjúkrahúsum, rættiliga frítt kann úttala seg – bæ›i vegna seg sjálva og vegna stovnin.

Kortini helt umbo›sma›urin, at ovasta lei›slan innan heilsuverki› kann geva stovnslei›aranum bo› um, at hann bert skal úttala seg vegna stovnin eftir nærri gó›kenning. Slík bo› hev›i danski læknastjórin ikki fingi›, og ta› er heldur ikki greitt, at føroyski sjúkrahúslei›arin hev›i fingi› líknandi bo›.

Hóast umbo›sma›urin í hesum málinum gjørdi greitt, at lei›arar á sjálvstø›ugum alemnnum stovnum frítt kunnu úttala seg, mælti hann í hesum málinum kortini til, at slíkir lei›slupersónar n‡ta talufrælsi sítt vandaliga og vi› umhugsni.

Umbo›sma›urin vísti eisini á, at bert er, um lei›arar kunna ovastu lei›sluna beinlei›is um tann kritikkin, teir ætla sær at leggja alment fram.

Tá ræ›ur um ra›festingar á tínum øki, hevur tú sum alment starvsfólk serligan rætt at koma til or›anna, sta›festir umbo›sma›urin kortini.

Jákup Mørkøre, tann føroyski sjúkrahúslei›arin, sum var› sagdur úr starvi, tí útsagnir hansara vór›u mettar at vera illoyalar móti politiska myndugleikanum, hevur kært máli› fyri rættin.

Ingibjørg Berg hevur veri› forma›ur í tí arbei›sbólkinum í Grundlógarnevndini, sum hevur vi›gjørt politisk mannarættindi

Mynd: Álvur Haraldsen

Bert ein javna›arlisti á Tvøroyri

Fyri fyrstu fer› í 20 ár stilla bæ›i javna›arfeløgini á Tvøroyi upp á einum lista

EIRIKUR LINDENSKOV

Javna›arflokkurin á Tvøroyri er nú li›ugur vi› uppstillingina til b‡rá›svali›. Fyri fyrstu fer› í 20 ár ver›ur bert tann eini javna›arlistin á Tvøroyri.

Ta› var í 1984, at ósemja var í Fro›biar Sóknar Javna›arfelag, sum førdi til, at nøkur fólk tóku seg úr felagnum og stovna›u Tvøroyarar Sosialdemokratiska felag.

Arbeitt ver›ur í løtuni vi› at leggja feløgini saman aftur, og er uppstillingin til b‡rá›svali› hesafer› fyrsta stigi›.

Tveir av b‡rá›slimunum, sum vór›u valdir seinast, Sverre Midjord og Jóannes Eidesgaard eru ikki á listanum hesafer›. Annars eru fólk úr bá›um feløgunum á listunum.

Á Tvøroyri eru sjey b‡rá›slimir, og hev›i Javna›arflokkurin vanliga meirilutan einsamallur fyri 1984. Seinast vór›u tr‡ umbo› vald á listanum hjá Tvøroyrar Sosialdemokratiska felag og eitt umbo› fyri listan hjá Fro›biar Sóknar Javna›arfelag, sum stilla›i upp á felagslistanum, i› skipa›i samgongu.

Listin hjá javna›arfeløgunum er hesin:

Hervør Eidesgaard, Tvøroyri
Pauli Einarsson, Trongisvágur
Dan Erik Johansen, Tvøroyri
Páll Michelsen, Fro›ba
Heri Mortensen, Trongisvágur
Jonhild Nielsen, Øravíkarlí›
Elisabeth Matras Olsen, Tvøroyri
Fró›i Olsen, Tvøroyri
Poul Olsen, Trongisvágur
Bartal Nolsøe Poulsen, Fro›ba
Kári Sørensen, Trongisvágur

- Kundu havt nógv fleiri rækjuskip

Um rækjuskipini komu undir FAS-skipanina og harvi› fingi› skatt afturgoldnan hev›i hetta veri› møguligt

STEFAN Í SKORINI

Fiskiskapurin er á gó›ari lei›, men prísurin á rækjum lágur, og oljuprísurin er himmalhøgur.

Hetta er sannleikin, sum tey flestu av okkara rækjuskipum mugu liva vi› í løtuni. Hetta er tó ikki ein stø›a, sum kann halda á í longri tí›arskei›.

Fiskiskip eisini undir FAS

Ta›, i› Bjarni Petersen , skipari og partaeigari í Arctic Viking, skj‡tur upp, er, at fiskiskip, sum ikki eru í føroyskum øki og ikki troyta føroyskt tilfeingi, koma inn undir FAS-skipanina.

Henda skipanin ber í sær, at rei›aríi› fær 28 prosent av skattinum hjá manningini afturgoldnan. Í løtuni koma øll tey føroysku farmaskipini undir FAS-skipanina, men einki fiskiskip.

Í Danmark er líknandi skipan, sum kallast DIS, og danski farmaflotin er í tí skipanini.

Bjarni heldur, at tey skip, sum ikki hava naka› vi› føroyskar kvotur at gera og ikki eru í føroyskum sjógvi, skulu koma undir FAS-skipanina.

Pláss fyri fleiri

Bjarni metir, at pláss hev›i veri› fyri eini 5 rækjubátum afturat í føroyska flotanum, um tey eisini komu undir FAS-skipanina. Ta› ber bara ikki til, tí úrtøkan er ikki nóg høg til tess nú. FAS-skipanin hev›i hinvegin veri› vi› til at gjørt hetta møguligt.

- Ta› er ein sannroynd, at seinastu tíggju árini er ein rækjubátur farin av knóranum um ári›. Um FAS-skipanin hev›i veri› galdandi, hev›i hon kunna› bjarga einum parti av teimum, tí kappingarføri betrast, sigur Bjarni Petersen.

Í løtuni liggja føroysku rækjubátarnir í har›ari kapping vi› a›rar, sum ikki hava eins høgar manningarh‡rur sum tey føroysku skipini. Føroysku rei›aríini hava størri útrei›slur vegna hægri manningarh‡rur, og ta› ger, at tey eru verri fyri.

Grønlendskir og kanadiskir rækjubátar hava eina manningarh‡ru, sum liggur á 21 prosentum, me›an tann føroyska er uppi á 36 prosentum. Nor›menn kunnu eisini renta nógv d‡rari skip vegna lægri manningarh‡ru. Skip úr Grønlandi og Kanada hava eisini so gó›ar vei›imøguleikar, og tí fær manningin nógv, hóast h‡ran í prosentum er lág.

Tann har›a kappingin ger ta› enn torførari hjá teimum føroysku bátunum at hóra undan.

- Kjarnin er, at vit eru í altjó›a øki í har›ari kapping vi› a›rar vi› væl lægri manningarh‡ru, og tí eru teir meira kappingarførir fyri enn vit. Tá so fiskiskapurin aftur minkar, eru vit í vanda fyri at rúka út, sigur Bjarni Petersen.

Um rækjubátarnir eisini komu undir FAS-skipanina, hev›i munurin millum tey føroysku skipini og tey í grannalondunum ikki veri› so stórur.

Kunnu finna n‡ggjar lei›ir

Bjarni Petersen hevur í summar veri› vi› Arctic Viking, sum P/F Lí›in eigur. í kanadiskum sjógvi og fiska rækjur. Vei›an var eini 10 tons í mi›al um samdøgri›, og ta› er heilt hampuligt.

Hann heldur, at FAS-skipanin kundi veri› vi› til at føroyskir bátar fóru á n‡ggjar lei›ir at royna eftir rækjum. Ta› kundi veri› á Hatton Bank ella vi› Falklandsoyggjarnar, men í løtuni ber ta› ikki til, tí úrtøkan er ikki nøktandi.

Vi› at loyvt fiskiskipum undir FAS-skipanina kundi landi› veri› vi› til at veitt óbeinlei›is stu›ul til hesi skipini. Hetta hev›i vi›ført fleiri n‡ggj arbei›spláss og eitt ví›ka› føroyska vei›iøki. Eisini hev›i ta› komi› væl vi›, nú flotin er so meint raktur av teimum høgu oljuprísunum.